# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV@
SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*Ein skúli, har næstan eingin dumpar, verður sjálvandi ikki ein skúli fyri øll*

*A. Guttormur Djurhuus*

## Skammið tykkum!

Eitt land, sum ikki hevur ráð at verja tey veikastu í samfelagnum, er eitt fátækt land. At lække tænastustøðið hjá børnum við serligum tørvi, er átaluvert í góðum tíðum sum í ringum tíðum.

Tað man neyvan meira nakar veikari bólkur í samfelagnum enn fjølbrekaði børn. Óansæð hvønn politiskan lit, man hevur og óansæð hvat man annars heldur um viðurskifti í hesum samfelagnum, so munnu øll verða á einum máli um, at hesin bólkur eigur at fáa mannsømilig kor. Man kann diskutera eftirlønaraldur og almannaveitingar annars, men tá tað kemur til brekaði og fjølbrekaði børn, so er tað ein indiskutabul bólkur. Hann skal fáa ta hjálp, ið honum tørvar.

Vit frætta í hesum døgum um fólk, ið umhugsa at flyta av landinum, tí at Føroya land ikki hevur nakað at bjóða hesum bólki. Tað er ikki tí, at skipanin var fullkomin, áðrenn nýligu broytingarnar, langt frá tí, men at man skal fara at gera eitt afturstig, sum hóttir við at reka okkara borgarar av landinum, er púra burturvið.

Her má onkur seta seg at rokna aftureftir. Politikarnir mugu gera sær greitt, hvat hesum bólki tørvar, og so má man rokna aftureftir frá tí og finna útav, hvussu hetta kann umsitast smidligast møguligt, og hvat hetta kostar. At landið ikki skal nøkta tí tørvi, sum er, er ikki ein møguleiki.

Í tí stóra raðfestingarlistanum yvir, hvussu almennir pengar skulu brúkast, er hetta eitt øki, sum skal fáa tað, ið tørvur er á, hóast hesin bólkur av góðum grundum ikki er tann, ið rópar harðast.

At Føroya Løgting yvirhøvur sker hjá hesum bólki er skammiligt og vekir hetta ikki beinleiðis nakað álit á, at politikarnir fara at raðfesta rætt, tá raðfestast skal. Betong og asfalt er eitt, men tá um menniskju ræður, so má tað raðfestast fremst.

Nú hevur hetta ikki nakað við blokkstuðulin at gera sum so, men í hvussu so er setir hetta mál, prátið um enn ein niðurskurð í perspektiv.

**Sosialurin**

## Skúli fyri øll – skúli fyri ongan

**A. GUTTORMUR DJURHUUS**



Fyrst fingu vit PISA-kanningina sum vísti, at vitanarstøðið í okkara skúlum er sera lágt. Men tað var tíbetur bert ein virðisleys undankanning, sum næmingarnir ikki tóku í álvara. Sum rektarin á okkara lærara-skúla so rætt tók til: »PISA-kanningin hevur prógvað, at hon einki nyttar til. Hon er dumpað!«

Til alla lukku kom Hagstovan við eini kanning sum vísti, at her stóð væl til. Vit eru millum fremstu samfeløg, tá tað kemur til hægri útbúgvingar. Her skal eingin koma og siga, at vitanarstøðið er lágt hjá okkum, dundraði stjórin á stovninum.

So kom upptøkuroyndin til Danmarks Journalisthøjskole, har 10 unglingar við góðari útbúgving og vælmotiverðir søktu um upptøku. Teir dumpaðu – allir sum ein. Helst var tað tí, at royndin var lagað til donsk viðurskifti. Og fyri alt tað, hava vit ikki sjálvsagdan rætt til, uttan upptøkuroynd, ávíst tal av læruplássum á Danmarks Journalisthøjskole?

Ein skúli, har (næstan) eingin dumpar, verður sjálvandi ikki ein skúli fyri øll. Tað verður ein skúli fyri sibbar – ein sibbaskúli har tú kann fáa prógv um hægri útbúgving uttan stórvegis strev. Tað var tað, sum kanningin hjá Hagstovuni vísti.

## Er løtan tann rætta?

**HELGI ABRAHAMSEN**



**Hóast ein íløga í sær sjálvum kann vera eitt stórt framstig fyri samfelagið, so er ikki vist, at løtan altíð er tann rætta til at gera íløguna**

Politikkur snýr seg ikki bara um at taka støðu til, hvat skal gerast í samfelagnum, men tað er líka so nógv ein spurningur um, NÆR tingini skulu henda.

Onkuntíð kann tað vera rætt at halda aftur í almennu peninganýtsluni, men til aðrar tíðir kann tað vera líka neyðugt at brúka pengar. Tað er hesin veruleiki, sum ofta verður gloymdur í søguligum høpi. Tá verður mangan drigið fram at "tit vóru ímóti at...", ella "tit vóru fyri at...", uttan at hugsað verður um, hvussu tíðirnar vóru, tá tingini hendu, ella ikki hendu.

### Sandoyartunnilin

Norðoyatunnilin var ikki meira enn opnaður, so byrjaði tosið um Sandoyartunnilin, og tað sær ikki út til at nerva so nógv, at hann kann fara at kosta 800 mió. krónur at gera, og at hann møguliga skal gerast samstundis sum aðrar dýrar útbyggingar verða gjørdar á samferðsluøkinum.

Øll vita, at tunnilin er sera dýrur, og at hann verður ikki goldin aftur við bummpengum, men næstan eingin torir at siga nakað ímóti ætlanini, tí øll vita eisini, at tá tunnilin einaferð er komin ígjøgnum, fara tey sum róptu harðast um at fáa hann gjørdan her og nú, at standa og breiða seg og siga, at "eg trúði alla tíðina uppá tað, men tað gjørdu hini ikki". Soleiðis kann tað sum ger teg ábyrgdarleysan í dag, gera teg til hetju í morgin.

Orð sum "vit hava ikki ráð til at lata vera" eru í royn og veru bara ein annar máti at siga, at vit hava ikki ráð, men vit vilja kortini.

### Íløgur í bíðirøð

Í fleiri ár hava nógvar íløgur staðið í bíðirøð, tí stórur partur av íløgujáttanini á løgtingsfíggjarlógini skuldi brúkast til nýggja Smyril. Nú tosa vit um eina íløgu, sum er tríggjar ferðir so dýr sum Smyril, og givið er, at skulu aðrar íløgur aftur setast í bíðirøðina tey næstu átta til tíggju árini, so kann íløgutørvurin gerast rættiliga stórur aðrastaðni í landinum, tá nøkur ár eru fráliðin. Hetta má eisini havast í huga, tá støða verður tikin til eina so stóra einstaka ætlan.

### Møguliga er rætta løtan nú ?

Eg veit av góðum grundum ikki, hvussu búskaparstøðan í Føroyum verður tey komandi árini, og eg skal tí ikki útiloka, at tað kann vera skilagott at fara undir Sandoyartunnilin nú. Men tað er sera umráðandi at hugt verður gjølla eftir avleiðingunum, áðrenn ein so stór íløga verður gjørd. Politikarar mugu vera vaksnir frá at siga, at íløgan skal gerast her og nú, kosta hvat tað kosta vil. Føroyska samfelagið hevur fyrr brent seg av slíkum politikki.

Landskassin hevur framvegis undirskot, og um vit ikki fáa vent undirskotinum til yvirskot nú meðan inntøkurnar vaksa, so klára vit tað heldur ikki, tá inntøkurnar aftur fara at minka. Og undirskot kunnu vit ikki hava í allar ævir.

Vit noyðast at hyggja eftir støðuni í samfelagnum sum heild, áðrenn ein so stór íløga verður gjørd.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.